# Kunngerðablaðið A

2010 Hefti 15

ISSN 0907-905X


Nr. 62 31. mai. 2010

**Løgtingslóg**
**um**
**Húsalánsgrunn**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**Kapittul 1**
**Endamál**

**§ 1.** Endamálið við Húsalánsgrunninum er at veita lán sambært §5.

**Kapittul 2**
**Fyrisiting**

**§ 2.** Grunnurin verður fyrisitin av einum stýri við 3 limum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir.
*Stk. 2.* Stýrið skipar seg sjálvt við formanni.
*Stk. 3.* Starvstíðin hjá stýrinum er 4 ár.
*Stk. 4.* Stýrið setir stjóra at hava dagligu umsitingina av grunninum. Stýrið kann eisini leggja dagligu umsitingina til ein annan almennan stovn.
*Stk. 5.* Samsýningin til stýrislimirnar skal góðkennast av landsstýrismanninum.

**§ 3.** Stýrið ger starvsskipan fyri virksemi sítt. Uppskotið til starvsskipan skal góðkennast av landsstýrismanninum.

**§ 4.** Stjórin teknar grunnin saman við einum stýrislimi. Stýrið kann veita umboðsfulltrú.
*Stk. 2.* Loyvt er ikki stýrislimum, stjórn og starvsfólki grunsins at reka ella taka lut í spekulasjónshandlum.
*Stk. 3.* Veitast kann ikki stýrislimum, stjórn og starvsfólki ella grannskoðara hjá grunninum lán uttan góðkenning landsstýrismansins í hvørjum føri sær.

**Kapittul 3**
**Lánisløg**

**§ 5.** Húsalánsgrunnurin kann veita veðskuldarlán til sethús og íbúðir, har endamálið við lánunum er at fíggja endurnýggingar og umbyggingar, soleiðis at orkunýtslan minkar.
*Stk. 2.* Øll lán skulu veðsetast innan fyri 80% av metingarvirðinum við tinglýstum veðbrævi, ognarbrævi, skaðaloysisbrævi o.l. í somu fastogn ella við aðrari samsvarandi trygd.
*Stk. 3.* Áðrenn lán verða veitt, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð reglur og treytir um lánsveiting sambært stk. 1.

**§ 6.** Grunnurin kann avskriva áogn, um ein ítøkilig meting av fíggjarligu støðu skuldarans talar fyri hesum. Sama er galdandi fyri áogn hjá Húsalánsgrunninum, Bjálvingarstuðulslánsgrunninum og Íbúðagrunninum sambært løgtingslóg nr. 118 frá 18. juni 1997 um Húsalánsgrunn o.a.

**Kapittul 4**
**Ársroknskapur, grannskoðan og eftirlit**

**§ 7.** Roknskaparár Húsalánsgrunsins er álmanakkaárið.
*Stk. 2.* Roknskapur Húsalánsgrunsins verður grann-

skoðaður av løggildum grannskoðara, valdur av stýrinum.

*Stk. 3.* Ársfrásøgnin, sum í minsta lagi skal fevna um eina leiðsluátekning, eina fíggjarstøðu, eitt rakstrarúrslit, notur, undir hesum frágreiðing um, hvør roknskaparmannagongd er fylgd, broytingar í eginognini og frágreiðing frá stýri og stjórn um virksemi í farna árinum, verður send landsstýrismanninum fyri 1. juli á hvørjum ári.

**§ 8.** Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við stovninum. Tryggingareftirlitið útinnir uttanhýsis eftirlitið sambært nærri reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir. Grunnurin hevur skyldu at lata eftirlitinum allar upplýsingar um grunsins viðurskifti, sum eftirlitið ynskir.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann gera avtalu við Tryggingareftirlitið um eftirlit sambært reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir.

## Kapittul 5
## Kærurættur

**§ 9.** Kæra um avgerðir grunsins kunnu verða lagdar fyri landsstýrismannin.

*Stk. 2.* Kærast skal innan fýra vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann taka avgerð um, at heimildin hjá landsstýrismanninum eftir stk. 1 kann leggjast til eina kærunevnd.

## Kapittul 6
## Gildiskoma og skiftisreglur

**§ 10.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2010. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 118 frá 18. juni 1997 um Húsalánsgrunn o.a. Fyri lán, givin sambært løgtingslóg nr. 118 frá 18. juni 1997 um Húsalánsgrunn o.a., verður lógin tó framvegis galdandi.

*Stk. 2.* Grunnurin sambært hesi lóg tekur við allari ogn og skuld og rættindum og skuldbindingum hjá Húsalánsgrunninum, Bjálvingarstuðulslánsgrunninum og Íbúðagrunninum sambært løgtingslóg nr. 118 frá 18. juni 1997 um Húsalánsgrunn o.a.

Tórshavn, 31. mai 2010

**Kaj Leo Johannesen**
løgmaður

Lm. nr. 37/2009

Nr. 63 2. juni 2010

# Kunngerð um gravarhjálp

Við heimild í § 7 í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd verður ásett:

**§ 1.** Persónar, sum hava rætt til veitingar sambært § 1 í lógini, hava rætt til gravarhjálp.

**§ 2.** Gravarhjálp er í mesta lagi 5.000 kr.
*Stk. 2.* Gravarhjálp verður veitt soleiðis:
1) 100% av gravarhjálpini verður veitt persóni yvir 15 ár,
2) 85% fyri 9-15 ára gamalt barn,
3) 60% fyri 1-8 ára gamalt barn og
4) 40% fyri barn undir 1 ár.

**§ 3.** Gravarhjálp verður veitt til útreiðslur í sambandi við kistu og líkverju.

**§ 4.** Umsókn um gravarhjálp skal sendast Heilsutrygd. Kvittan fyri útreiðslur sambært §3 skal fylgja við umsóknini.

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar 2010.

Heilsumálaráðið, 2. juni 2010

**Aksel Johannesen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)

# Kunngerð um val av kommunulækna

Við heimild í § 3, stk. 3 í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd verður ásett:

**§ 1.** Persónar, búsitandi í Føroyum, skulu velja kommunulækna í egnum læknadømi. Kommunulæknin skal vera fevndur av sáttmála ímillum Heilsutrygd og Kommunulæknafelag Føroya.
*Stk. 2.* Heilsutrygd heitir í brævi á borgarar, sum ikki hava valt kommunulækna, um at velja kommunulækna í egnum læknadømi. Heilsutrygd kunnar í brævinum hvørjar kommunulæknar veljast kann ímillum.
*Stk. 3.* Velur ein persónur ikki kommunulækna innan 30 dagar eftir áheitanina, tillutar Heilsutrygd ein kommunulækna til viðkomandi.

**§ 2.** Persónar, sum áðrenn 1. januar 2010 vórðu at meta sum B-limir í gomlu sjúkrakassaskipanini, skulu velja kommunulækna í egnum læknadømi áðrenn 1. januar 2011.
*Stk. 2.* Fyrrverandi B-limir hava, fyrstu ferð tey velja, møguleika at velja kommunulækna uttanfyri egið læknadømi, um so er, at tey áður hava verið knýtt at hesum kommunulækna.
*Stk. 3.* Hevur ein persónur ikki valt kommunulækna innan 1. januar 2011, velur Heilsutrygd ein kommunulækna í egnum læknadømi til viðkomandi.

**§ 3.** Nýval av kommunulækna fer fram við at venda sær til Heilsutrygd við skrivligari umsókn. Hevur Heilsutrygd móttikið umsókn innan 15. í mánaðinum, kann nývalið fáa virknað frá 1. í eftirfylgjandi mánað.
*Stk. 2.* Eftir at nýval er farið fram, kann nýtt nýval í fyrsta lagi fara fram eftir 6 mánaðum.
*Stk. 3.* Gera serligar umstøður seg galdandi, kann nýval fara fram og fáa virknað, áðrenn freistina í stk. 1, í samsvari við sáttmála ímillum Heilsutrygd og Kommunulæknafelag Føroya.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, 2. juni 2010

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)

# Kunngerð um trolveiði innan fyri 12 fjórðingar

Við heimild í § 9, stk. 2 og § 40, stk. 2 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, við seinni broytingum, verður ásett:

*Loyvi og leiðir*

**§ 1.** Eftir umsókn og við loyvi frá Fiskimálaráðnum er loyvt fiskifari, sum er 120 bruttotons (BT) til støddar og minni at trola eftir flatfiski innan fyri 12 fjórðingar úr grundlinjunum sambært ásetingum i hesari kunngerð og treytum settar í fiskiloyvinum.
*Stk. 2.* Talið av fiskiloyvum til trolveiði innan fyri 12 fjórðingar er talið av loyvum, sum vóru í gildi í 2009.

**§ 2.** Leiðirnar, sum eru umfataðar av hesi kunngerð, og tíðarskeiðini, tá tað er loyvt at fiska á teimum, eru:

**Øki A2:** Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 14. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1) 62°20’30” N 05°48’30” W
2) 62°11’00” N 05°51’50” W
3) 62°11’00” N 06°07’30” W
4) 62°20’30” N 06°01’00” W
5) 62°20’30” N 05°48’30” W
Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

**Øki A1:** Í tíðarskeiðinum frá 8. juni til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 14. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1) 62°20’30” N 06°01’00” W
2) 62°11’00” N 06°07’30” W
3) 62°11’00” N 06°11’30” W
4) 62°20’30” N 06°05’00” W
5) 62°20’30” N 06°01’00” W

**Øki B:** Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 14. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1) 62°11’00” N 05°51’50” W
2) 61°48’10” N 06°01’40” W
3) 61°53’50” N 06°24’30” W
4) 61°58’20” N 06°22’00” W
5) 62°02’50” N 06°26’30” W
6) 62°11’00” N 06°07’30” W
7) 62°11’00” N 05°51’50” W
Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

**Øki C**: Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1) 61°48’10” N 06°01’40” W
2) 61°42’00” N 06°04’15” W
3) 61°47’30” N 06°27’45” W
4) 61°53’50” N 06°24’30” W
5) 61°48’10” N 06°01’40” W
Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

**Øki D**: Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 14. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1) 61°14’40” N 07°02’20” W
2) 61°29’10” N 07°22’30” W
3) 61°33’50” N 07°10’40” W
4) 61°26’30” N 07°03’30” W
5) 61°25’10” N 07°07’00” W
6) 61°18’00” N 06°54’30” W
7) 61°14’40” N 07°02’20” W
Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

**Øki E:** Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 14. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1) 61°29’10” N 07°22’30” W
2) 61°32’40” N 07°27’00” W
3) 61°37’20” N 07°15’10” W
4) 61°34’50” N 07°08’10” W
5) 61°29’10” N 07°22’30” W
Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

**Øki F:** Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 8. juli, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1) 61°32’40” N 07°27’00” W
2) 61°39’00” N 07°35’40” W
3) 61°48’30” N 07°12’15” W
4) 61°37’20” N 07°15’10” W
5) 61°32’40” N 07°27’00” W
Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

**Øki G:** Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 14. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

1) 61°45’40” N 07°19’20” W
2) 61°57’30” N 07°35’20” W
3) 62°00’00” N 07°29’00” W
4) 61°58’00” N 07°21’00” W
5) 61°48’30” N 07°12’15” W
6) 61°45’40” N 07°19’20” W

**Øki H**: Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 1. juli, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1) 62°31’00” N 07°12’30” W
2) 62°33’20” N 06°58’30” W
3) 62°26’30” N 06°58’30” W
4) 62°24’30” N 07°12’30” W
5) 62°31’00” N 07°12’30” W
Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

**Øki I**: Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 14. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1) 62°33’20” N 06°58’30” W
2) 62°35’40” N 06°33’30” W
3) 62°29’40” N 06°33’30” W
4) 62°26’30” N 06°58’30” W
5) 62°33’20” N 06°58’30” W
Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

**Øki J**: Í tíðarskeiðinum frá 1. juni til 17. juli, báðir dagar íroknaðir, og frá 1. august til 14. september, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1) 62°35’40” N 06°33’30” W
2) 62°20’30” N 05°48’30” W
3) 62°20’30” N 06°01’00” W
4) 62°25’50” N 06°05’00” W
5) 62°29’40” N 06°33’30” W
6) 62°35’40” N 06°33’30” W
Linjan úr 1. staði í 2. stað verður drigin eftir 12 fjórðinga markinum.

*Reiðskapur*

**§ 3.** Tað er bert loyvt at nýta trol, sum ikki í nøkrum parti hevur meskar, ið fara niður um 120 mm, og sum hevur innsetta rist við 40 mm millum rimarnar. Hevur trolið ein ovara posa í sambandi við ristina, skal meskavíddin í hesum minst vera 180 mm og vera gjørdur úr tráði dupult í mesta lagi 6 mm til tjúktar.
*Stk. 2.* Partroling er ikki loyvd.
*Stk. 3.* Einki fiskifar má nýta meira enn eitt trol í senn.

*Trolposin*

**§ 4.** Tvørmátið á tráðnum í posanum eigur ikki at fara upp um 8 mm. Netið framman fyri posan, millumstykkið, skal ikki vaksa í ummáli úr forkanti í afturkant, og pláturnar í yvir- og undirpartinum skulu vera eins. Meskarnir í hvørjari plátu skulu vera skornir eftir síðu og ikki í nøkrum føri eftir leggi. Posin skal vera úr rektangulerum plátum, har yvir- og undirpláturnar eru eins. Ummálið í forkanti á posanum má ikki vera víðari enn afturkantur á millumstykkinum. Loyvt er at sneiða 3 tær aftastu meskarnar í posanum inneftir.
*Stk. 2.* Tað er ikki loyvt at snøra posan ella á nakran hátt at bera so í bandi, at meskarnir ikki standa fult mát. Tó er loyvt á niðara posanum:
a) at knýta tilfar, ið bert verður fest framman og á síðurnar, á undirsíðuna av trolposanum, fyri at minka um slit,
b) at lata festið til gjørðina ganga gjøgnum spellið, og møguliga vera fest í spellið, tó soleiðis, at spellið ikki liggur fast at posanum av hesi orsøk.
*Stk. 3.* Tað er ikki loyvt at brúka gjarðir (rundstroppar), tó er loyvt at hava eina gjørð (lyftistropp) í posanum til at býta sundur við. Gjørðin skal ikki vera styttri enn 70 prosent av ummáli trolposans, mált við strektum meski tvørturum á posanum á tí staðnum, har gjørðin er fest til posan.

*Hjáveiða*

**§ 5.** Hjáveiðan av toski og hýsu skal hvønn túr sær ikki fara upp um 35% tilsamans av vektini av veiðinøgdini av øðrum fiskasløgum enn toski og hýsu.

*Minstamát*

**§ 6.** Reglurnar um minstamát á fiski í kunngerð um fiskiskapin í føroyskum sjógvi við fiskiførum, sum eru skrásett í Føroyum, galda fyri fiskifør við loyvi sambært hesi kunngerð.

*Aðrar ásetingar*

**§ 7.** Um fiskifar á sama túri hevur fiskað uttan fyri 12 fjórðingar eisini, verða hjáveiðireglurnar fyri fiskiskapin innan fyri 12 fjórðingar at galda fyri allan túrin.

**§ 8**. Fiskifar við loyvi sambært hesi kunngerð skal í tíðarskeiðinum, sum troling er loyvd innan fyri 12 fjórðingar sambært kunngerðini, føra serliga dagbók, har m.a. øki og knattstøða fyri hvørt hál og veiða (fiskaslag og nøgd í rundari vekt) verður uppgivin. Fiskifar, sum einstakar túrar roynir uttan fyri 12 fjórðingar í tíðarskeiðinum, sum troling innan fyri 12 fjórðingar er loyvd, skal eisini føra hesar túrar í serligu dagbókina fyri leiðirnar innan fyri 12 fjórðingar. Dagbókin skal sendast Fiskiveiðieftirlitinum aftaná hvønn túr sær.

*Revsing*

**§ 9.** Tann, sum brýtur §§ 2-5 og § 8 í hesi kunngerð verður revsaður við bót**,** um ikki harðari revsing er ásett eftir aðrari lóg. Um brot er framt av partafelag, smápartafelag, lutafelag ella líknandi, kann felagið sum slíkt verða revsað við bót sambært § 40, stk. 3 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

*Stk. 2.* Sambært § 45 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap kann Fiskiveiðieftirlitið beinanvegin taka inn fiskiloyvi, um skipari á fiskifari er skuldsettur fyri brot á hesa kunngerð, ella um fiskifarið ikki hevur hildið seg til treytir ásettar í fiskiloyvinum sambært hesi kunngerð. Fiskiloyvi kann verða tikið aftur upp til 4 vikur hvørja ferð.

*Gildiskoma*

**§ 10**. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 32 frá 27. mai 2004 um trolveiði innan fyri 12 fjórðingar.

Fiskimálaráðið, 3. juni 2010

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/Andras Kristiansen (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um afturgjaldsskyldu í sambandi við bústaðarbroytingar

**§ 1**

Í kunngerð nr. 15 frá 6. mars 2007 um afturgjaldsskyldu í sambandi við bústaðarbroytingar, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Inngangurin verður orðaður soleiðis: „Við heimild í § 18 e, stk. 3 í lov for Færøerne om offentlig forsorg, sbr. lovbekendtgørelse nr. 100 af 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 179 frá 22. desember 2009, verður ásett:“

2) Í § 2, stk. 2 verður „almennu virðismetingina av núverandi“ broytt til: „virðismetingina av verandi“.

3) Í § 2 verður sum stk. 3 sett:
„*Stk. 3*. Almannastovan nýtir húsameklaravirki ella Húsalánsgrunnin at gera virðismetingina sbrt. stk. 2.“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd

Almannamálaráðið, 7. juni 2010

**Rósa Samuelsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)

# Kunngerð um grannskoðaraváttanir v.m.

Við heimild í § 15, stk. 4 og § 51, stk. 2 í løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir verður ásett:

## Kapittul 1 Almennar ásetingar

**§ 1.** Grannskoðari er alment álitisumboð, tá ið grannskoðarin váttar við trygd, og hetta er krav sambært lóggávuni, ella ikki einans er ætlað til egna nýtslu hjá tí, sum hevur biðið um váttanina. Tað sama er galdandi, tá ið grannskoðari ummælir leiðslufrágreiðingar.
*Stk. 2.* Grannskoðari skal orða váttanir og ummæli óheft av tí, sum hevur biðið um váttanina ella ummælið, og við atliti til tey viðurskifti, ið móttakararnir vanliga mugu væntast at leggja dent á, tá ið teir taka avgerðir. Grannskoðari skal tí taka støðu til øll viðurskifti, uttan so at hesi hava lítlan týdning fyri endamálið við váttanini ella ummælinum, og annað ikki er ásett í lóggávuni v.m.
*Stk. 3.* Grannskoðari skal orða váttanir og ummæli á einum eintýddum og lætt skiljandi máli.
*Stk. 4.* Móttakarar sambært hesi kunngerð eru persónar, virkir og almennir stovnar v.m., har váttanin ella ummælið, vanliga má væntast at ávirka tær avgerðir, ið tiknar verða.

**§ 2.** Ein roknskapur er í hesi kunngerð at skilja sum:
1) ein ársfrásøgn, ein ársroknskapur, samtaksroknskapur, ein partsársfrásøgn, ein partsársroknskapur og eitt partsárssamtaksroknskapur sambært anordning nr. 1355 frá 9. desember 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven (ársroknskaparlógin), við seinni broytingum, umframt
2) ein annar samsvarandi roknskapur, ið ikki er fevndur av nr. 1, og sum í minsta lagi inniheldur eina rakstraruppgerð, ein javna og greinandi viðmerkingar, og sum hevur eitt alment endamál og vendir sær móti einum breiðum skara av brúkarum.

## Kapittul 2 Givnar váttanir

### *Grannskoðanarátekning á grannskoðaðar roknskapir*

**§ 3.** Grannskoðanarátekning á ein roknskap er grannskoðarans váttan um ta gjørdu grannskoðanina.
*Stk. 2.* Um ein ársroknskapur og ein møguligur samtaksroknskapur er grannskoðaður, skal ein grannskoðanarátekning vera í ársfrásøgnini, ið fevnir um allar teir partar, sum skylda er at grannskoða. Um ársfrásøgnin hevur eina leiðslufrágreiðing, sum ikki er grannskoðað, skal eitt ummæli frá grannskoðaranum harumframt vera í grannskoðanarátekningini, sbr. § 5, stk. 1, nr. 7.
*Stk. 3.* Móðirvirki, sum leggja fram roknskap sambært § 2, nr. 1 ella 2, og sum leggja fram samtaksroknskap, skulu hava eina felags grannskoðanarátekning fyri ársroknskapin og samtaksroknskapin. Ásetingarnar í §§ 5-8 verða at nýta samsvarandi.

**§ 4.** Skal grannskoðari sambært avtalu vátta við trygd á eina ella fleiri ískoytisfrágreiðingar, ið er partur av ársfrásøgnini, kunnu váttanirnar fyri frágreiðingarnar gerast hvør sær. Slíkar váttanir verða gjørdar sambært §§ 13-16.

**§ 5.** Grannskoðanarátekningin skal í minsta lagi hava hesar upplýsingar í hesari raðfylgju:
1) Eina eyðmerking av roknskapinum, ið er grannskoðaður, og hvør roknskaparligur hugtakskarmur er nýttur í sambandi við at roknskapurin er gjørdur,
2) eina umrøðu av ábyrgd grannskoðarans fyri grannskoðanini umframt eina umrøðu av, gjørdu grannskoðanini, sbr. stk. 2,
3) fyrivarni sambært § 6, ella upplýsing um, at átekningin er uttan fyrivarni, sbr. stk. 3,
4) eina niðurstøðu viðvíkjandi gjørdu grannskoðanini, sbr. stk. 4-6,
5) ískoytisupplýsingar viðvíkjandi viðurskiftum í roknskapinum sbr. § 7, stk. 1,
6) ískoytisupplýsingar viðvíkjandi øðrum viðurskiftum, sbr. § 7, stk. 2 og
7) har leiðslufrágreiðing er gjørd, eitt ummæli frá grannskoðara um, hvørt gjøgnumgongd grannskoðarans av leiðslufrágreiðingini, grundað á tað gjørdu grannskoðanina av ársroknskapinum og einum møguligum samtaksroknskapi, hevur givið orsøk til viðmerkingar, sbr. stk. 7 og 8.

*Stk. 2.* Í umrøðuni av ábyrgd grannskoðarans og av gjørdu grannskoðanini, skal verða upplýst um endamálið við grannskoðanini, hvussu grannskoðað er og um teir grannskoðanarstandardir, sum eru nýttir í sambandi við grannskoðanina. Um grannskoðanin fevnir um annað enn roknskapin, skal hetta upplýsast fyri seg.
*Stk. 3.* Er átekningin uttan fyrivarni, skal grannskoðarin týðiliga tilskila: »Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.«.
*Stk. 4.* Í niðurstøðuni skal verða upplýst, um roknskapurin er gjørdur í samsvari við lóggávu og møgulig onnur krøv til framløgu av roknskapi. Undir hesum skal verða upplýst um roknskapurin, um

hetta er ásett í lóggávuni ella í øðrum ásetingum, gevur eina rættvísandi mynd av ogn og skuld hjá virkinum, fíggjastøðu umframt úrslitið í samsvari við nýtta roknskaparliga hugtakskarmin ella lýkur onnur samsvarandi almenn dygdarkrøv.

*Stk. 5.* Niðurstøðan skal antin vera uttan fyrivarni, við fyrivarni ella við avsannan, sbr. stk. 6. Um grannskoðarin ikki kann gera eina niðurstøðu um grannskoðanina, skal hetta verða upplýst í einum parti fyri seg aftaná partin um "Fyrivarni".

*Stk. 6.* Ein niðurstøða við avsannan hevur upplýsingar um, at roknskapurin ikki lýkur kravið um, at geva eina rættvísandi mynd av ogn og skuld hjá virkinum, fíggjarstøðu umframt úrslitið í samsvari við nýtta roknskaparliga hugtakskarmin ella ikki lýkur onnur samsvarandi, almenn dygdarkrøv.

*Stk. 7.* Ummæli av leiðslufrágreiðingini skal, um samsvar ikki er við ársroknskapin ella ein møguligan samtaksroknskap, og hetta er íkomið av ikki ótýðandi feili í leiðslufrágreiðingini, hava upplýsingar um, hvar møgulig ósamsvar eru. Um grannskoðari harumframt verður varugur við týðandi feilir og manglar í leiðslufrágreiðingini, skal ummælið eisini fevna um eina frásøgn um hesi viðurskifti.

*Stk. 8.* Upplýsingar sambært stk. 1, nr. 7, skulu standa í einum serligum parti við yvirskriftini "Ummæli av leiðslufrágreiðingini".

*Stk. 9.* Tann ella teir grannskoðarar, sum eru valdir at grannskoða, skulu dagfesta og undirskriva grannskoðanarátekningina. Er talan um eitt grannskoðanarvirki, skulu teir grannskoðarar undirskriva átekningina, sum hava fingið grannskoðanina latna upp í hendur. Navnið á grannskoðanarvirkinum og grannskoðaranum og harafturat tilskilan, um viðkomandi er løggildur ella skrásettur grannskoðari, skal standa týðiliga í átekningini, sbr. tó stk. 10.

*Stk. 10.* Ein grannskoðari, sum er góðkendur eftir § 10, stk. 1 í grannskoðaralógini, skal skriva fakliga heiti, sum viðkomandi hevur rætt til sambært góðkenning eftir reglum, ið fremja fyriskipan hjá ES-tinginum og Ráðnum um lógbodna grannskoðan av ársroknskapum og konsolideraðum roknskapum.

**§ 6.** Grannskoðari skal taka fyrivarni í grannskoðanarátekningini, um:

1) grannskoðarin við støði í tí gjørda grannskoðanarpróvnum ger ta niðurstøðu, at roknskapurin hevur týðandi feilir ella manglar, ella
2) grannskoðarin ikki er førur fyri at fáa eitt nóg gott ella skikkað grannskoðanarprógv til at kunna gera ta niðurstøðu, at roknaskapurin er uttan týðandi feilir.

*Stk. 2.* Fyrivarni skulu altíð verða tikin eftir stk. 1, tá ið:

1) roknskapurin ikki lýkur kravið um, at vísa eina rættvísandi mynd av ogn og skuld hjá virkinum, fíggjarstøðu umframt úrslitið hjá virkinum samsvarandi nýtta roknskaparliga hugtakskarmin, ella roknskapurin ikki lýkur onnur samsvarandi almenn dygdarkrøv,
2) roknskapurin ikki hevur kravdar upplýsingar, ella ikki lýkur treytirnar fyri, at lata vera við at taka kravdar upplýsingar við, uttan so at tær vantandi upplýsingarnar eru ótýðandi,
3) óvissa viðvíkjandi roknskaparuppgerðini ella óvanligar umstøður, ið hava havt ávirkan á roknskapin, ikki eru nóg væl upplýstar,
4) roknskapurin er gjørdur undir tí fyritreyt, at virksemið heldur fram, men grannskoðarin metir, at fyritreytirnar ikki eru til staðar,
5) umstøður av týdningi fyri roknskapin ikki eru nóg væl upplýstar fyri grannskoðaranum,
6) grannskoðarin ikki kann gera eina niðurstøðu um partar av roknskapinum ella roknskapinum í síni heild, ella
7) roknskapurin í aðramáta ikki er gjørdur í samsvari við krøv í lóggávu ella í øðrum ásetingum um roknskaparframløguna.

*Stk. 3.* Tekur grannskoðari fyrivarni, skal hetta greitt tilskilast í grannskoðanarátekningini. Fyrivarni skal standa í einum parti fyri seg undir heitinum: „Fyrivarni".

*Stk. 4.* Grannskoðari skal í grannskoðanarátekningini týðiliga grundgeva fyri sínum fyrivarnum.

*Stk. 5.* Grannskoðari skal upplýsa, um eitt fyrivarni hevur so avgerandi týdning, at aðalfundurin ikki eigur at góðkenna roknskapin.

**§ 7.** Grannskoðari skal veita ískoytisupplýsingar í grannskoðanarátekningini um møgulig viðurskifti í roknskapinum, sum grannskoðarin vísir á uttan at taka fyrivarni.

*Stk. 2.* Grannskoðari skal altíð veita ískoytisupplýsingar, um lóggávan um bókhald og um at varðveita roknskapartilfar ikki er hildin, og brotið ikki er ótýðandi. Ískoytisupplýsingar skulu harumframt veitast fyri seg um viðurskifti, sum grannskoðari hevur fingið kunnleika til í samband við sítt arbeiði, og sum geva ein grundaðan varhuga av, at limir í leiðsluni kunnu koma undir endurgjalds- ella revsiábyrgd fyri gerðir ella óvirkni, ið viðkoma virkinum, tilknýttum virkjum, virkisluttakarum, ognarum ella starvsfólkum. Upplýsast skal altíð um brot á:

1) Kapittul 28 í revsilógini og á skatta-, avgjalds- og studningslóggávuna,
2) vinnufelagsrættarligu lóggávuna ella samsvarandi lóggávu, ið er galdandi fyri virkið,
3) lóggávuna um roknskaparframløgu, undir hesum um bókhald og um at varðveita roknskapartilfar.

*Stk. 3.* Ískoytisupplýsingar mugu ikki setast ístaðin fyri eitt fyrivarni.

*Stk. 4* Upplýsingar sbr. stk. 1 skulu standa í einum parti fyri seg undir heitinum: „Ískoytisupplýsingar um viðurskifti í roknskapinum", meðan upplýsingar sbr. stk. 2 skulu standa í einum parti fyri seg undir heitinum „Ískoytisupplýsingar um onnur viðurskifti".

**§ 8.** Verður í grannskoðanarátekningini víst til roknskapin, skal verða víst til ítøkiligar upphæddir ella viðmerkingar í roknskapinum ella ítøkiligar partar í einari møguligari leiðslufrágreiðing.

*Váttanir um gjøgnumgongd(review) av roknskapum*

**§ 9.** Ein váttan um gjøgnumgongd (review) av einum roknskapi skal í minsta lagi hava hesar upplýsingar í hesari raðfylgju:

1) Eina eyðmerking av roknskapinum, sum er gjøgnumgingin,
2) eina umrøðu av ábyrgd grannskoðarans, sbr. stk. 2,
3) eina umrøðu av innihaldinum í tí gjørdu gjøgnumgongdini (review), undir hesum at grannskoðan ikki er gjørd,
4) fyrivarni, sbr. § 10,
5) eina niðurstøðu, sbr. stk. 3 og 4 og
6) ískoytisupplýsingar, sbr. § 11.

*Stk. 2.* Í umrøðuni av ábyrgd grannskoðarans skal verða upplýst um teir standardar, ið grannskoðarin hevur nýtt í sambandi við gjøgnumgongdina (review).

*Stk. 3.* Í niðurstøðu grannskoðarans skal standa, um grannskoðarin við síni gjøgnumgongd (review) er blivin varugur við viðurskifti, ið geva høvi til at gera ta niðurstøðu, at roknskapurin ikki gevur eina rættvísandi mynd av ogn og skuld hjá virkinum, fíggjarstøðu umframt úrslit í samsvari við roknskaparliga hugtakskarmin, sum er nýttur, ella onnur samsvarandi, almenn dygdarkrøv (avmarkað trygd).

*Stk. 4.* Niðurstøðan skal antin vera uttan fyrivarni, við fyrivarni ella avsannan, sbr. § 5, stk. 5. Um grannskoðarin ikki kann gera eina niðurstøðu um roknskapin, skal hetta verða upplýst í einum parti fyri seg aftaná partin um “Fyrivarni”.

*Stk. 5.* Tann ella teir grannskoðarar, sum eru valdir at gera gjøgnumgongdina, skulu dagfesta og undirskriva váttanina. Er talan um eitt grannskoðanarvirki, skulu teir grannskoðarar undirskriva váttanina, sum hava fingið latið upp í hendur at gera gjørnumgongdina. Navnið á grannskoðanarvirkinum og á grannskoðaranum og harafturat tilskilan, um viðkomandi er løggildur ella skrásettur grannskoðari, skal standa týðiliga í átekningini, sbr. tó stk. 6.

*Stk. 6.* Ein grannskoðari, ið er góðkendur eftir § 10, stk. 1 í grannskoðaralógini, skal skriva sítt fakliga heitið, sum hann hevur rætt til sambært góðkenning eftir reglum, ið fremja fyriskipan hjá ES-tinginum og Ráðnum um lógbodna grannskoðan av ársroknskapum og konsolideraðum roknskapum.

**§ 10.** Grannskoðari skal í váttanini taka fyrivarni í teimum førum, nevnd í § 6, stk. 1.

*Stk. 2.* Tekur grannskoðari fyrivarni, skal hetta týðiliga tilskilast í váttanini. Fyrivarnið skal standa í einum parti fyri seg undir heitinum: ”Fyrivarni”.

*Stk. 3.* Grannskoðari skal í váttanini týðiliga grundgeva fyri sínum fyrivarnum.

**§ 11.** Grannskoðari skal í váttanini veita ískoytisupplýsingar um møgulig viðurskifti, sum grannskoðarin vísir á uttan at taka fyrivarni.

*Stk. 2.* Ískoytisupplýsingar mugu ikki setast í staðin fyri eitt fyrivarni. Upplýsingarnar skulu standa í einum parti fyri seg undir heitinum: ”Ískoytisupplýsingar”.

**§ 12.** Verður í váttanini víst til roknskapin, skal verða víst til ítøkiligar upphæddir ella viðmerkingar í roknskapinum ella til ítøkiligar partar í einari møguligari leiðslufrágreiðing.

*Aðrar váttanir við trygd*

**§ 13.** Gevur grannskoðari aðrar váttanir við trygd, ið ikki eru fevndar av §§ 3-12, verða reglurnar í §§ 14-16 at galda.

**§ 14.** Ein váttan við trygd eftir § 13 skal í minsta lagi hava hesar upplýsingar í hesari raðfylgju:

1) Eyðmerking av viðurskiftunum, sum váttanin verður givin um (váttanarevnið) og eina lýsing av váttanaruppgávuni,
2) eina umrøðu av ábyrgd grannskoðarans og tí arbeiði, sum er gjørt, sbr. stk. 2,
3) fyrivarni, sbr. § 15,
4) eina niðurstøðu um arbeiðið, ið er gjørt, sbr. stk. 3-5 og
5) ískoytisupplýsingar, sbr. § 16.

*Stk. 2.* Í umrøðuni av arbeiðinum, sum er gjørt, skal verða upplýst um endamál og slag av váttanaruppgávu, undir hesum um nýttar standardar.

*Stk. 3.* Í sambandi við eina váttanaruppgávu við høgum stigi av trygd, skal tað standa í niðurstøðuni hjá grannskoðaranum, um váttanarevnið gevur eina rættvísandi mynd ella er gjørt í samsvari við tey nýttu atlitini, sum váttanin er mett ella mátað eftir. Í sambandi við eina váttanaruppgávu við avmarkaði trygd, skal tað standa í niðurstøðuni hjá grannskoðaranum, um grannskoðarin í sambandi við arbeiðið er blivin varugur við viðurskifti, ið geva orsøk til at gera ta niðurstøðu, at váttanarevnið ikki gevur eina rættvísandi mynd ella ikki er gjørt í samsvari við tey nýttu atlitini, sum mett ella mátað er eftir.

*Stk. 4.* Niðurstøðan skal antin vera uttan fyrivarni, við fyrivarni ella avsannan, sbr. stk. 5. Um grannskoðarin ikki kann gera eina niðurstøðu um váttanarevnið, skal hetta verða upplýst í einum parti fyri seg aftaná partin um “Fyrivarni”.

*Stk. 5.* Ein niðurstøða við avsannan inniheldur upplýsingar um, at váttanarevnið ikki gevur eina rættvísandi mynd ella ikki er gjørt í samsvari við tey nýttu atlitini, sum mett ella mátað er eftir.

*Stk. 6.* Tann ella teir grannskoðarar, sum eru valdir at gera váttanaruppgávuna, skulu dagfesta og undirskriva váttanina. Er talan um eitt grannskoðanarvirki, skulu teir grannskoðarar undirskriva váttanina, sum hava fingið váttanaruppgávuna latna upp í hendur. Navnið á grannskoðanarvirkinum og grannskoðaranum, og harafturat tilskilan um viðkomandi er løggildur ella

skrásettur grannskoðari, sbr. tó stk. 7, skal standa týðiliga í váttanini.
*Stk. 7.* Ein grannskoðari, ið er góðkendur eftir § 10, stk. 1 í grannskoðaralógini, skal skriva sítt fakliga heiti, sum hann hevur rætt til sambært góðkenning eftir reglum, ið fremja fyriskipan hjá ES-tinginum og Ráðnum um lógbodna grannskoðan av ársroknskapum og konsolideraðum roknskapum.

**§ 15.** Grannskoðari skal taka fyrivarni í váttanini, um týðandi feilir ella manglar hava verið í teimum upplýsingum, sum eru lagdir til grund í sambandi við arbeiðið, ella grannskoðarin ikki er førur fyri at fáa nóg góða og egnaða skjalprógvan fyri at kunna gera ta niðurstøðu, at váttanarevnið er uttan týðandi feilir. Eisini skal grannskoðari taka fyrivarni, um óvissa ikki er nóg væl upplýst, og henda óvissa ikki er ótýðandi.
*Stk. 2.* Tekur grannskoðari fyrivarni, skal hetta greitt tilskilast í váttanini.
*Stk. 3.* Grannskoðari skal í váttanini týðiliga grundgeva fyri sínum fyrivarnum.

**§ 16.** Grannskoðari skal í váttanini veita ískoytisupplýsingar um møgulig viðurskifti, sum grannskoðarin vísir á uttan at taka fyrivarni.
*Stk. 2.* Ískoytisupplýsingar mugu ikki setast í staðin fyri eitt fyrivarni.

## Kapittul 3
## Revsireglur

**§ 17.** Brot á § 1, stk. 2, §§ 3-12, §§ 14-16 verður revsað við bót.
*Stk. 2.* Feløg v.m. (løgfrøðiligir persónar) kunnu koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kap. 5 í revsilógini.

## Kapittul 4
## Gildiskoma og skiftisreglur

**§ 18.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, samstundis fer úr gildi Kunngerð nr. 116 frá 18. desember 2008 um grannskoðaraváttanir v.m.
*Stk. 2.* Kunngerðin hevur virknað fyri roknskaparár, sum byrja 1. januar 2010 ella seinni.

Vinnumálaráðið, 7. juni 2010

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

# Kunngerð um reglur at fremja gott skil og umsjón við næmingunum í skúlatíðini

Við heimild í § 60 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 34 frá 28. apríl 2009, hevur landsstýrismaðurin fyrisett:

## Kapittul 1 Innleiðing

**§ 1.** Við støði í meginreglum ásettum í hesi kunngerð ger skúlastýrið reglur um fyriskipanir til at fremja gott skil í skúlanum, um umsjón við næmingunum í tímum, fríkorterum, matarsteðgi o. ø. og um trivnaðarætlan skúlans, serliga viðvíkjandi happing.
*Stk. 2.* Reglurnar sbrt. stk. 1 skulu gerast soleiðis, at tær taka støði í viðurskiftunum á staðnum. Tær eiga at taka atlit at
1) aldri og førleika næminganna,
2) virksemi næminganna og
3) skúlaumhvørvi.
*Stk. 3.* Námsfrøðiliga ráðið skal hava uppskotið til reglurnar sbrt. stk. 1 til ummælis.

**§ 2.** Skúlaleiðslan hevur ábyrgd av at seta fyriskipanirnar í verk og skipa umsjónina millum starvsfólk skúlans.

## Kapittul 2 Umsjón

**§ 3.** Skyldan hjá skúlanum at hava umsjón við næmingunum, tá ið næmingarnir eru á skúlans øki, byrjar 10 minuttir, áðrenn undirvísingin byrjar og heldur uppat 10 minuttir eftir seinasta tíma hjá næminginum.
*Stk. 2.* Um næmingar møta meira enn 10 minuttir áðrenn tíðina, ella mugu bíða í skúlanum aftan á vanliga skúlatíð orsakað av, at skipaði næmingaflutningurin ikki hevur beinleiðis samband við skúlatíðina, skal kommunustýrið gera serliga avtalu við skúlaleiðsluna um, hvussu umsjónin verður framd.

## Kapittul 3 Umsjónarøkið

**§ 4.** Skúlin hevur skyldu til at hava umsjón við næmingunum, sum eru á skúlans øki.
*Stk. 2.* Vegurin millum heim og skúla er ikki íroknaður umsjónarøkið.
*Stk. 3.* Um undirvísing fer fram í hølum/økjum, sum eru burtur frá skúlanum, skal umsjón vera í hesum hølum/økjum og í sambandi við felags næmingaflutning millum skúlan og hesi høli/øki.
*Stk. 4.* Umsjón skal vera við næmingum, tá ið teir taka lut í skúlatiltøkum uttan fyri skúlans øki.
*Stk. 5.* Skúlaleiðarin kann í serligum førum gera undantak frá reglunum í §. 4, stk. 3 og 4.

## Kapittul 4 Umsjónarreglur

**§ 5.** Tann einstaki lærarin hevur umsjón við næmingunum í tímunum.
*Stk. 2.* Tá ein flokkur fær undirvísing í fleiri bólkum, kann umsjónarskyldan verða framd við vegleiðing lærarans.
*Stk. 3.* Bara í undantaksføri eiga næmingar at fáa loyvi til at fara út um skúlans øki í skúlatíðini. Í hesum førum eiga teir at fáa vegleiðing frá læraranum, áðrenn teir fara av skúlans øki, sbr. tó § 7, stk. 1.
*Stk. 4.* Umsjónarskyldan hjá lærara forðar ikki fyri, at einstakir næmingar, sum órógva undirvísingina, verða útihýstir frá restini av einum tíma, men lærarin hevur framvegis ábyrgd av umsjónini við næmingunum.
*Stk. 5.* Ábyrgdin fyri umsjónini við næmingunum kann við avtalu flytast millum starvsfólk skúlans.

**§ 6.** Tá ið undirvíst verður í lærugreinum, har serligur vandi kann standast av umstøðunum, hevur skúlin skyldu til at vera serliga ansin. Hetta er galdandi, tá ið undirvíst verður í alis- og evnafrøði, náttúra og tøkni, træsmíð, heimkunnleika, fimleiki, ítrótti, svimjing o. ø.

**§ 7.** Skúlaleiðarin kann gera av, at næmingar í 8. - 10. flokki hava loyvi at fara út um skúlans øki í føstu frítímunum.
*Stk. 2.* Skúlaleiðarin kann gera av, at reglurnar sbrt. stk. 1 eisini eru galdandi í fríkorterum og frítímum, sum vanliga ikki eru í tímaætlanini.
*Stk. 3.* Skúlaleiðarin kann í serligum førum nokta næmingum at fara út um skúlans øki í undirvísingartíðini.

**§ 8.** Tá ið skúlin skipar fyri tiltøkum uttan fyri skúlans øki, hava lærarar skyldu til at hava umsjón við næmingunum. Umsjón skal vera við næmingum, sum fara útferðir, vitja virki, eru í setursskúla, eru á ítróttarferðum o.a.t.

**§ 9.** Tá ið næmingar eru í starvsvenjing, hevur skúlin ikki umsjónarskyldu.
*Stk. 2.* Um skúlin veit um viðurskifti, sum kunnu skaða næmingin á arbeiðsplássinum, hevur leiðsla skúlans skyldu til at gera vart við viðurskiftini hjá rætta viðkomandi.
*Stk. 3.* Leiðsla skúlans skal kanna eftir, um

kommunan hevur tryggjað næmingarnar, eisini í starvsvenjingartíðini.

**§ 10.** Lærarar, sum eru varugir við viðurskifti á skúlans øki, sum kunnu verða vandafull fyri næmingar, skulu beinanvegin siga skúlaleiðaranum frá hesum.

## Kapittul 5
## Atferðarreglur

**§ 11.** Hesar reglur áseta karmarnar fyri, hvussu langt kann verða farið í royndunum at fáa næmingin at halda fyriskipanir skúlans.
*Stk. 2.* Skúlastýrið skal við grundarlagi í hesum meginreglum áseta reglur fyri atferð og góðum skili og reglur um, hvussu skúlin kann fyribyrgja happing.
*Stk. 3.* Skúlaleiðarin tekur í hvørjum einstøkum føri eftir samráð við lærarar næmingsins og foreldrini avgerð um at seta tiltøk í verk.

**§ 12.** Foreldur, næmingar og lærarar eiga at samstarva í royndunum at skapa góð viðurskifti í skúlanum.
*Stk. 2.* Um næmingur ikki heldur reglurnar, eiga lærarar at tosa við næmingin og foreldrini fyri at fáa fatan av, hvør orsøkin er til trupulleikarnar. Skúlin eigur altíð at samstarva við heimið, tá ið næmingar ikki halda reglurnar.

**§ 13.** Næmingur kann verða fluttur úr sínum flokki í annan flokk einstakar tímar ella restina av skúladegnum, um so er, at lærarin í samráð við skúlaleiðaran heldur, at hetta er neyðugt, fyri at undirvísingin kann fara fram í friði og náðum.

**§ 14.** Um so er, at næmingur hóast samrøður, átalur og ávaringar ikki heldur fyriskipanir skúlans, kunnu hesi tiltøk verða sett í verk:
1) Taka samrøðu við foreldrini so tíðliga sum gjørligt í 1. og 2. flokki, tá ið næmingur sýnir óhøviskan atburð.
2) Næmingur í 3. - 10. flokki verður frítikin fyri undirvísing í upp til eina viku.
3) Næmingur í 3. - 10. flokki verður fluttur í ein samsvarandi flokk í sama skúla.
4) Næmingur í 3. - 10. flokki verður fluttur í ein samsvarandi flokk í øðrum skúla í kommununi ella eftir avtalu við kommunustýrið í aðrari kommunu.
5) Næmingur í 10. flokki verður útskrivaður úr skúlanum.

**§ 15.** Um næmingur ikki kann fylgja undirvísingini, sbrt. § 14, nr. 2 og 3, skulu foreldrini hava boð frammanundan. Næmingur kann bert í serligum føri verða frítikin fyri undirvísing meira enn tvær ferðir í einum skúlaári.
*Stk. 2.* Um næmingur varandi verður fluttur í ein samsvarandi flokk í sama skúla sbrt. § 14, nr. 3, skulu foreldrini skrivliga hava havt høvi til at siga sína hugsan um flytingina.
*Stk. 3.* Um næmingur verður fluttur í annan skúla, sbrt. § 14, nr. 4, skulu foreldrini og skúlaleiðarin í tí skúlanum, sum tekur ímóti næminginum, góðtaka flytingina.
*Stk. 4.* Fæst ikki samtykki frá foreldrunum, kunnu skúlaleiðararnir, eftir at hava kunnað skúlastýrini í báðum skúlunum, taka avgerð um flytingina smbr. § 14, nr. 4.

**§ 16.** Skúlaleiðarin tekur eftir tilráðing frá floks-toyminum avgerð um at útskriva næming í 10. flokki smbr. § 14, nr. 5. Næmingurin og foreldrini skulu frammanundan hava høvi at siga sína hugsan um útskrivingina.
*Stk. 2.* Skúlin skal áðrenn útskrivingina vegleiða næmingin og foreldrini í møguligum útbúgvingar- og starvsmøguleikum.

**§ 17.** Tað er ikki loyvt at nýta likamliga revsing.
*Stk. 2.* Tað er tó loyvt at forða næmingi í at nýta harðskap móti øðrum, ella forða herverki ella skaða á bygningar og lutir.
*Stk. 3.* Um atgerð hevur verið nýtt móti næmingi sbrt. stk. 2, kann lærari alt fyri eitt útihýsa næminginum frá undirvísingini, og skal lærarin boða skúlaleiðaranum frá tilburðinum.
*Stk. 4.* Skúlaleiðarin boðar beinanvegin foreldrunum frá tilburðinum
*Stk. 5.* Eftir at hava hoyrt foreldrini, tekur skúlaleiðarin avgerð um, hvørji tiltøk skulu verða sett í verk.

**§ 18.** Um skúlaleiðarin eftir samráð við lærarar metir, at atferðartrupulleikarnir hjá næmingi eru elvdir av fakligum, sosialum ella kensluligum orsøkum, skal skúlin venda sær til Sernámsdepilin/NSR-tænastuna ella/og teir almennu myndugleikarnar á staðnum fyri at fáa samstarv um, hvør hjálp kann verða veitt næminginum.
*Stk. 2.* Áðrenn skúlin vendir sær til almennar mynd-ugleikar, skulu foreldrini verða hoyrd um ætlanir skúlans.

**§ 19.** Henda kunngerð fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og samstundis fara úr gildi rundskriv nr. 1 frá 12. januar 1994 um arbeiðsnáðir og gott skil í fólkaskúlanum og rundskriv nr. 1 frá 16. februar 1995 um umsjón við næmingum í skúlatíðini.

Mentamálaráðið, 9. juni 2010

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýrismaður

/ Leivur Harryson (sign.)

# Kunngerð um skúlavegleiðing

Við heimild í § 24 stk. 2 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 34 frá 28. apríl 2009, verður ásett:

**§ 1.** Skúlaleiðarin setur ein av lærarum skúlans sum skúlavegleiðara.
*Stk. 2.* Skúlar kunnu hava felags skúlavegleiðara og tilfarssavn.

**§ 2.** Skúlavegleiðarin skal hava staðið skúlavegleiðaraútbúgving.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í serligum føri gera undantak frá ásetingini um útbúgving smbrt. stk.1.

**§ 3.** Skúlavegleiðarin skipar fyri ráðgevingini og leiðbeiningini í samstarvi við leiðsluna og flokslæraran.
*Stk. 2.* Skúlavegleiðarin skal eisini samstarva við
1) aðrar útbúgvingar- og skúlavegleiðingarskipanir,
2) partarnar á arbeiðsmarknaðinum,
3) sernámsfrøðiligu skipanina og
4) foreldrini.

**§ 4.** Skúlavegleiðarin skal skipa fyri og hava um hendi tilfarssavn á hóskandi staði.
*Stk. 2.* Ásetingarnar um tilfarssavn, sbrt. stk. 1, kunnu lúkast við avtalu við skúlabókasavn ella annað bókasavn.
*Stk. 3.* Skúlavegleiðarin skal hava hóskandi skrivstovuhøli og amboð til taks innan arbeiðsøki sítt.

**§ 5.** Í hvørjum sjálvstøðugum skúla, sum hevur næmingar í 6. skúlaári ella eldri, verður skipað fyri skúlavegleiðing.

**§ 6.** Skúlavegleiðingin skal ráðgeva og leiðbeina næmingar í sambandi við útbúgvingar- og starvsval teirra og skipa arbeiðið í tráð við læruætlanir og ásetingar, sum hava heimild í § 8, stk. 1 nr. 3 í fólkaskúlalógini í kravda undirvísingarevninum útbúgvingar- og vinnulívskunning.

**§ 7.** Næmingar hava rætt til ráðgeving og leiðbeining í sambandi við útbúgvingar- og starvsval teirra.
*Stk. 2.* Næmingar, ið fara í starvsvenjing, skulu frammanundan hava kunning um arbeiðsmarknaðin og persónliga eftirmeting eftir starvsvenjingina.

**§ 8.** Ráðgevingin og leiðbeiningin fyri næmingar í 6. til 10. árgangi um útbúgvingar- og starvsval verður skipað sum felags undirvísing, ráðgeving og leiðbeining fyri bólkar og sum einstaklingaráðgeving og leiðbeining.
*Stk. 2.* Felagsráðgevingin og leiðbeiningin fatar um hesi evni:
1) Valgreina- og breytatilboð skúlans.
2) Onnur undirvísingartilboð enn fólkaskúlin.
3) Møguleikar at lúka undirvísingarskylduna.
4) Skipan, upptøkukrøv, møguleikar o.a. í útbúgvingarverkinum.
5) Vinnu- og arbeiðsmarknaðarviðurskifti.
*Stk. 3.* Einstaklingaráðgevingin og leiðbeiningin fatar um hesi evni:
1) Vegleiðaraarbeiði í skúlanum.
2) Útbúgvingar- og virkisætlan fyri tann einstaka.
3) Vegleiðing í sambandi við at velja vallærugrein og breyt.
4) Vegleiðing til næmingar við serligum tørvi.
5) Vegleiðing í sambandi við, at næmingur fer úr skúlanum í ótíð.

**§ 9.** Starvsvenjingin skal m.a. geva næmingum:
1) kunning um arbeiðsmarknaðin,
2) møguleika at royna ymisk arbeiði,
3) møguleika at taka lut í dagliga virkseminum á einum arbeiðsplássi og
4) betri førleika at velja útbúgving ella starv.

**§ 10.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, 9. juni 2010

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýrismaður

/ Leivur Harryson (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um Føroyska Altjóða Skipaskrá

**§ 1**

Í kunngerð nr. 83 frá 19. mai 1992 um Føroyska Altjóða Skipaskrá, sum seinast broytt við kunngerð nr. 98 frá 7. juli 2009 verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 24 verður strikað.

2) Í § 25, stk. 5 verður "jvb. § 24" broytt til "sambært §§ 1-3 í kunngerð um gjøld fyri skráseting v.m. í Føroysku Altjóða Skipaskrá".

3) Í § 45, stk. 1 verður "§§ 7-17, 23 og 24" broytt til "§§ 7-17, § 23 og §§ 1-3 í kunngerð um gjøld fyri skráseting v.m. í Føroysku Altjóða Skipaskrá".

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi tann 1. juni 2010.

Vinnumálaráðið, 8. juni 2010

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

# Kunngerð
# um
# gjøld fyri skráseting v.m. í Føroysku Altjóða Skipaskrá

Við heimild í § 10 a, stk. 2, § 10b , stk. 2 og § 12, stk. 2 og 3 í løgtingslóg nr. 78 frá 10. mars 1992 um Føroyska Altjóða Skipaskrá, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 41 frá 7. mai 2010, verður ásett:

*Gjøld fyri skrásetingar og avrit*

**§ 1.** Fyri upptøku og eigaraskifti av skipi í Føroysku Altjóða Skipaskránna, verður gjald kravt eftir hesum reglum:

1) Skip, sum eru til støddar undir 1.000 bruttotons (BT): kr. 50.000.
2) Skip, sum eru til støddar 1.000 bruttotons ella yvir, men undir 3.000 bruttotons (BT): kr.75.000.
3) Skip, sum eru til støddar 3.000 bruttotons (BT) ella yvir, men undir 10.000 bruttotons (BT): kr. 100.000.
4) Skip, sum eru til støddar 10.000 bruttotons(BT) ella yvir: kr. 125.000.

**§ 2.** Fyri tjóðskaparbræv verður gjald kravt eftir hesum reglum:

1) Skip, sum eru til støddar undir 1.000 bruttotons (BT): kr. 3.000.
2) Skip, sum eru til støddar 1.000 bruttotons ella yvir, men undir 3.000 bruttotons (BT): kr. 5.000.
3) Skip, sum eru til støddar 3.000 bruttotons (BT) ella yvir, men undir 10.000bruttotons(BT): kr. 10.000.
4) Skip, sum eru til støddar 10.000 bruttotons(BT) ella yvir: kr 20.000.

**§ 3.** Fyri skráseting av veð í skipi og hækkan av veðupphædd verður at gjalda kr. 5.000. Sama upphædd verður at gjalda fyri skráseting av transporti.

**§ 4.** Fyri at strika skip verður at gjalda kr. 500.

**§ 5.** Fyri avrit av skjølum verður at gjalda ómaksløn kr. 250.

*Ársgjald*

**§ 6.** Eigari av skipi, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, skal gjalda eitt árligt gjald pr. skip til Skipaeftirlitið.

*Stk. 2.* Fyri hvørt skip skrásett í Førovsku Altjóða Skipaskránni verður grundgjald á kr. 15.000 rindað, og harumframt eitt gjald, sum er ásett útfrá stødd á skipinum, sbr. talvu 1 og afturat hesum verður síðani lagt eitt prosentgjald, ásett útfrá aldri á skipinum, sbr. talvu 2.

Dømi: (Grundgjald á kr. 15.000 + BT) x alders faktor

Dømi: Skip A
Stødd: 4000 BT
Aldur: 16 ár

Útrokning:
Grundgjald + BT gjald, sbr. talvu 1 =
15.000 + 4000 = 19.000
Alders faktor, sbr. talvu 2: 16 ár = 15%
Árðsgjald = 19.000 x 1,15 = 21.850 kr.

Talva 1

| Bruttotons (BT) | | |
|---|---|---|
| Frá | Til | kr./BT |
| 0 | 3000 | 1,3 |
| 3001 | 7500 | 1,0 |
| 7501 | 24000 | 0,7 |
| 24001 | 30000 | 0,5 |
| 30001 | 45000 | 0,4 |
| 45001 | - | 0,3 |

Talva 2

| % ásett eftir aldri | | |
|---|---|---|
| Frá | Til | % |
| 0 | 4 | 0 |
| 5 | 9 | 5 |
| 10 | 14 | 10 |
| 15 | 19 | 15 |
| 20 | 24 | 20 |
| 25 | 29 | 50 |
| 30 | 49 | 75 |
| 50 | - | 100 |

*Stk. 3.* Árliga gjaldið verður kravt pr. 1. januar á hvørjum ári fyri hvørt skip, sum er skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, galdandi fyri inniverandi árið. Partur av gjaldinum verður ikki endurrindaður, um skip bert er skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni part av árinum, sum rindað er fyri.

*Stk. 4.* Tann, sum er skrásettur eigari pr. 1. januar, hevur skyldu til at rinda árliga gjaldið fyri alt árið.

*At flyta millum skráir*

**§ 7.** Skip, ið verður skrásett í skipaskrásetingini eftir at henda kunngerð er komin í gildi, og síðani verður flutt til Føroysku Altjóða Skipaskránna, kemur undir gjald sambært §§ 1-3 og § 6.

*Revsing*

**§ 8.** Tann, ið letur Føroysku Altjóða Skipaskrá skeivar upplýsingar í sambandi við skráseting v.m., kann verða revsaður við sekt.

*Stk. 2.* Feløg v.m. (løgfrøðiligir persónar) kunnu áleggjast revsiábyrgd eftir reglunum í kap. 5 í revsilógini.

*Gildiskoma*

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* Skip, sum eru í Føroysku Altjóða Skipaskránni, tá ið hendan kunngerð kemur í gildi, rinda tann 1. juli 2010 helvtina av árliga gjaldinum sambært § 6 fyri at vera í Føroysku Altjóða Skipaskránni í inniverandi ári.

Vinnumálaráðið, 8. juni 2010

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705